Kappingareftirlitið

PRÍSURIN Á MATVØRUM

Danski tjóðbankin sigur at, altjóða viðurskifti er orsøkin til høgu matvøruprísirnar í Danmark og í útlondum.

Danski tjóðbankin hevur gjørt eina greining av prísvøkstrinum í Danmark seinastu 5 árini, fyri at fáa svar uppá, hvørjar orsøkirnar eru. Prísirnir á matvørum í Danmark eru hækkaðir 32% í hesum tíðarskeiðið, sum er tvífalt samlaða prís-vøkstrinum. Sambært tjóðbankanum eru altjóða viðurskiftir høvuðsorsøkin til príshækkingarnar.

Høvuðsorsøkin til høga prísvøksturin í heiminum skyldast í høvuðsheitum, at eftirspurningurin hevur verið støðugur, samstundis sum útboðssíðan er viknað.

Útboðssíðan er viknað orsaka av COVID-19 farsóttuni, russisku innrásini í Ukraina, veðurlagsbroytingum og órógv í veitingar-kervinum. Serliga hava príshækkingar á Kálva- og neytakjøti, kaffi og kakao verið drívmegin handan samlaða prísvøksturin.

1. Drívmegin handan príshækkingarnar

Príshækkingin á kálva- og neytakjøtið skal finnast í einum øktum eftirspurningi, serliga í USA og Kina, ímeðan neytastovnurin er munandi minkaður í USA og Europa.

Í Danmark kemur áleið 80% av øllum neytakjøtið frá mjólkineytum, og tí at man hevur økt um mjólkamongdina fyri hvørja kúgv, er lægri tørvur á mjólkineytum og tí verður eisini minni flett.

Kaffi prísirnir hava verið undir trýsti síðani 2021, serliga vegna óhepnum veðurlagi í Brasilia, sum er heimsins størsti kaffiframleiðari. Ímeðan útboði er minkað, er eftirspurningurin verið vaksandi, sum hevur styrkt ójavnvágina. Útlitini eru fyri at kaffiframleiðslan er áveg upp aftur. Væntandi verða framleiðslutølini fyri 2025 góð, og tí eru príslækkingar komandi árini í væntu.

Eftirspurningurin av kakao er nógv øktur, samstundis við at útboðið er lækkað. Framleiðslan er minkað vegna sjúku í kakaobønunum í Vesturafrika, samstundis sum at veðurlíkindi hava verið ring, og fáar íløgur hava verið í vinnuna.

Tjóðbankin væntar, at hesir tríggir bólkar, sum hava verið størsta drívmegin handan príshækkingarnar og bera áleið helvtina av samlaði príshækkingini á matvørum, frameftir fara at varðveita leiklutin, sum tær drívandi kreftirnar.

Framtíðarútlitini eru, at prísvøksturin ikki fer at steðga í næstu framtíð, men útlit eru til at javnvág verður millum útboð og eftirspurning, tá núverandi órógv á marknaðunum eru farin framvið.

Tó kann væntast, at tílíkt órógv verður alsamt vanligari orsaka av verðurlagsbroytingum, sum

hevur við sær ógvusligari verður. Hetta vil tarna framleiðsluna. Brúkarin skal tí vera fyrireikaður uppá, at frameftir fara matvøruprísir at vera meira svingandi enn teir áður hava verið.

2. Realløn og treysti

Realløn í Danmark hevur verið hækkandi í tíðarskeiðinum, tó so at at lønarhækkingin liggur lægri enn prísvøksturin á matvørum. Parturin av inntøkuni hjá brúkaranum, sum fer til matvørur, er lutfalsliga størri hjá láginntøkubólkinum enn hjá háginntøku-bólkinum, og tí kann man siga, at ein høgur prísvøkstur á matvørum rakar harðari hjá teimum við lágum inntøkum.

Tjóðbankin vísir á, at prísvøkstur á matvørum og drekkivørum hevur størri kensluligan týdning fyri fatanina hjá brúkaranum av prísvøkstrinum í búskapinum, enn prísvøkstur á øðrum vørum.

Víst verður á, at hóast prísvøksturin samlað ikki hevur verið serliga høgur, heldur brúkarin at tað hevur verið so. Hetta skyldast, at tá ið prísir á mati og drekka hækka, so er tað ein príshækking, sum merkist dagliga, tí brúkarin ferð til handils oftari at keypa matvørur, enn at keypa aðrar vørur og tænastur.

Hesar niðurstøður liggja nær teimum, sum Kappingareftirlitið gjørdi, tá ið Kappingar-eftirlitið gav eina grein út í februar í ár, har eisini var víst á, at prísvøksturin á matvørum seinastu 5 árini skal finnast uttan fyri Føroyar.

Greinin hjá danska tjóðbankanum kann lesast her: https://www.nationalbanken.dk/da/viden-og-nyheder/publikationer-og-taler/analyse/2025/globale-forhold-driver-hoeje-foedevarepriser-i-danmark-og-udlandet

Greinin hjá Kappingareftirlitinium kann lesast her: https://vs.cdn.fo/savn/o1rnumqu/matvoeruprisir-i-foeroyum.pdf?s=ss6tk6KbpHtRlCSuia8lPoR19Eo